*Framhald av síðu 12*

ið frá ævigum tíðum hevur verið tagt um,men sum nú er komin fyri ljósið, og við profetiskum skriftum, eftir boði hins æviga Guds, kunngjørdur fyri øllum heidningunum til at virka trúarlýdni- Honum, hinum eina vísa Gudi, verið dýrdin við Jesusi Kristi, í aldur og allar ævir! Amen. Rómbr. 25-27.

Men lat okkum fara til gamla testamenti. Longu á fyrsta blaði lesa vit hetta: Gud segði: Ja Gud hevur talað. Skriftirnar eru Guds tala til okkum, ikki menniskjans filosofi. Gud talaði beinleiðis til menniskja áðrenn syndafallið. Í 1. mósebók 2. kapitli 16. versi stendur: Gud Harrin gav Ádami hetta boð: „Tú hevur loyvi at eta osfr.“ Og í 3,9: „ Tá rópti Harrin Gud á Ádam og segði við hann: „Hvar ert tú?““

So fall menniskja í synd, og samfelagið við Gud varð brotið, og viðurskiftini gjørdust heilt ørvísi millum menniskja og Gud, enn tey høvdu verið frammanundan. Men Gud helt áfram at tala til menniskja, at opinbera seg.

Eg kann taka nøkur dømi avtrat: Gud talaði við Nóa, við Ábraham, Ísak og Jákup, tað er ikki neyðugt við meira, mósibøkurnar eru fullar av hesum, serliga tá ið vit koma til Móses og øll boðini, hann fekk beinleiðis frá Gudi. Hvussu ofta lesa vit hetta: „Harrin talaði við Móses og segði“. Eg havi ikki talt.

Í 1. Sámuelsbók 3. kapitli talar Gud við ein smádrong ella tannáring, nevniliga Sámuel profet.

Lat meg taka nøkur dømi um hvussu profetanir byrja bøkur sínar, tað var sanniliga ikki filosofi, teir komu við: Esaias, kapitul 1 vers 2:“ Hoyri, tit Himlar, lurta, tú jørð! Tí Harrin talar“. Hoseas:“Orð Harrans, ið kom til Hoseas,son Be`eri, á døgum Uzziasar, Jótams, Akazar og Ezekiasar judakonga, og á døgum Jerobohams, sonar Jóasar, ísraelskongs. Táið Harrin byrjaði at tala við Hoseas, segði Harrin við hann“ osfr. Jónas. „Orð Harrans kom til Jónas, son Amittai; Hann segði“.

Allar Tær profetisku bøkurnar byrja á henda ella líknandi hátt uttan Dánielsbók, men hann var ikki minst profetur fyri tað. Profetiini hjá honum røkka heilt til okkara tíð og so nógv longur, heilt til tíð endans.

Jú, vissuliga er bíblian ein profetabók. Tað er ikki av tilvild at henda samling av bókum endar soleiðis:

Eg vitni fyri einum og hvørjum, sum hoyrir profetorðini í hesi bók: Leggur nakar nakað avtrat hesum, skal Gud leggja á hann plágurnar, sum skrivað er um í hesi bók. Og tekur nakar nakað burtur av orðunum í hesi profetabók, skal Gud taka lut hansara burtur frá træi lívsins og úr hinum heilaga staði, sum skrivað er um í hesi bók.

Eingin hevur lagt meira vekt á skriftirnar enn Harrin Jesus sjálvur. Hann segði við jødarnar, skriftin talar um meg. Tá ið djevulin freistaði hann, nýtti hann skriftirnar. Og tá ið hann var uppafturrisin, hevði hann ein langan bíbliutíma fyri tveimum lærisveinum, meðan teir gingu millulm bygdir og vísti á, at skriftirnar talaðu um hann.

Hóast bókin „Antin ella“ er ímóti skriftini, so sýnist sum høvundurin er ein søkjandi sál. Bókin er ógvuliga torfør at skilja, tykir mær, og eg skal til seinast citera eitt brot úr bókini. Har í endanum, er høvundurin so nær at fáa um rætta endan, men tíverri tykist hann ikki at hava skilt sannleikan. Her er nokk hjá honum, sum hjá so mongum av okkum, evangeliið er so einfalt og greitt, at vit mugu blíva sum børn fyri at skilja tað, so einfalt er tað. Vit mugu ikki brúka vit okkara, soleiðis sæð, at vit seta spurningar, men taka ímóti, ella sum høvundurin so væl sigur tað har: ásanna at frelsan er fullgjørd.

Eg citeri nú stykkið, sum eg sipi til, bróti inn í samanhangin á síðu 188 , og tað eru tær fýra seinastu reglurnar, eg serliga hugsi um: „Vit minnast, hvussu Kierkegaard brúkti Sokrates, fyri at menniskjan betur skuldi skilja tað sjálvsagdа. So hetta merkir, at nýta vit heitið kristin um okkum sjálv, so skal hetta heiti umfatast av tí eymýkt, reiðiligheit og sjálvjáttan, at alt er Guds verk, og mín egna trúgv er einki annað enn ásannanin av hesum veruleika.“ So langt, Ó. R.

Hetta er tað. Paulus sigur tað á henda hátt: Um tí ein er í Kristusi, er hann nýggjur skapningur; hitt gamla er farið - tað er vorðið nýtt. Og alt er tað frá Gudi, sum við Kristusi samdi okkum við seg sjálvan og og gav okkum tænastu sáttarinnar, tí í Kristusi samdi Gud heimin við seg sjálvan og tilroknar teimum ikki syndir teirra, og Hann hevur lagt niður í okkum orð sáttarinnar. Vit eru tá sendiboð í stað Kristusar, sum tað hevði verið Gud í áminti við okkum; Vit biðja í stað Kristusar: Verið sátt við Gud! Hann, sum kendi ikki synd, gjørdi hann til synd fyri okkum, fyri at vit í Honum skulu verða rættvísi Guds. 2. korintbr. 5,17-21.

Her sigur Paulus, at í Kristusi samdi Gud heimin við seg sjálvan, og síðani sigur hann : Verið sátt við Gud. Hetta kann tykjast sum ein sjálvmótsøgn, men ásanna vit hetta, at Gud hevur samt okkum við seg sjálvan, so eru vit jú frí og kunnu siga við frímóði, eg eri farin yvir um frá deyða til lív. Trúgvin kemur av tí, sum prætika verður. Rómbr. 10,17.

**Fuglafirði**
**nýggjársaftan 2006.**

**Richard Danielsen**

# Aftur eitt ár á Malta í Hirtshals

**POUL JÓHAN DJURHUUS**
gjarnanes@post.olivnat.fo






Nú er aftur eitt nýtt ár byrjað á Malta í Hirtshals. Tá vit hyggja aftur á árið, sum er farið, so mugu vit sanna, at Harrin var góður, og at hann unti okkum nógvar ymiskar tænastur millum føroyingar her í Jútlandi. Vit fara undir tað nýggja árið við góðum treysti, tí vit vita hvønn vit virka fyri, og hvat okkara mál er.

Vit fara at ynskja tykkum, sum stukku inn á gólvið í farna árinum, eitt av Harranum vælsignað 2007. Tit gleddu okkum, tá tit vitjaðu, annaðhvørt tit komu til møti ella privat, og tit skula vita, at tit eru altíð vælkomin á Malta. Eisini eru tit vælkomin at ringja, um tað er onkur tænasta vit kunnu gera.

Eins og undanfarnu mongu ár so fara vit aftur í ár, hvønn mánað, at ferðast “suður á land” sum vit plaga at taka til her á Malta. Her verður hugsað um støð sum Ålborg, Esbjerg, Vejle og Sønderborg. Vit hava notið stóra vælvild frá leiðslunum í teimum ymisku kirkjunum og stovnunum, sum vit hava brúkt hølini hjá nú ígjøgnum mong ár. Hetta eiga avvarðandi leiðslur eina stóra tøkk fyri og ivist eg ikki eina løtu í tí, at hetta eisini er noterað í Himli.

Eisini vilja vit í hesum sambandi nevna tey, sum ígjøgnum øll hesi árini hava verið okkara samverkafólk á teim ymsu støðunum. Hesi hava fyrireikað hølini, rudda upp, tikið sær av matgerð og eisini sent út innbjóðingar bæði skriftliga og telefoniskt. Fólk við tílíkum uppgávum verða, innan arbeiði hjá Trúboðarafelagsskapinum Operation Mobilisation, kallaði við einum so fínum heiti sum “lineup people,” sum merkir fólkini á staðnum. Um arbeiðið, sum hesi fólkini gera, ikki verður gjørt, so doyr arbeiðið burtur. Tí vilja vit eisini takka tykkum, sum ígjøgnum hesi mongu ár trúfast hava víst ábyrgd og hjartalag fyri arbeiðinum, sum samkoman á Malta hevur roynt at havt gangandi í Jútlandi.

Á hesum støðum hava vit í mong ár sett stevnu við nógvar av okkara landsmonnum um Guds orð. Tað kann vera ymiskt sum uppmøtingin hevur verið, men gjøgnumgangandi hevur tað verið tikið ómetaliga væl undir við hesum møtum.

Tað er okkum ein ómetaliga stór gleði at fáa loyvið til at tala Guds orð til landsmenn okkara, sum eru í eini útisetastøðu, og eisini at fáa loyvi til eitt persónligt prát, sum er ein upplagdur møguleiki undir tílíkum umstøðum, og vóna vit, at hetta kann vera báðum pørtum til gagn og gleði.

Vit hava altíð bjóða til ein drekkamunn eftir møtini, og tað koma vit eisini at gera framyvir. Hesar løturnar, við einum “kaffikoppi” í hondini, hava latið upp fyri nógvum góðum samrøðum, og vit hava so nógv at tala saman um, serliga tí vit eru útisetar. Eisini eru tað tey, sum beinleiðis ynskja eina samrøðu um tey andaligu viðurskiftini, og tað er altíð ein serlig gleði, tí tað er júst tað, sum vit eru her til.

Í komandi ár verður ein fyribilsbroyting í samband við hølisviðurskiftini í Esbjerg. Tey sera snotiligu, rúmligu, hugnaligu og ljósu hølini í Sædding Center, sum vit hava brúkt til møtini í mong ár, verða í komandi ári býtt um við samkomusalin hjá Den Kristne Forsamling á Spangbjerg Møllevej 16c í Mølleparken. Hetta kemur longu í kraft nú í januar. Umstøðurnar har eru ikki so rúmligar sum í Sædding Center, men hølini liggja væl fyri í miðstaðarøki, og tey eru hugnalig og ljós og eisini væl egnaði til tílíkar fundir. Hetta er tó ikki fyrstu ferð, at vit hava tey føroysku møtini í Mølleparken, tað hevur fleiri ferðir verið roynt áður. Vit vóna, at fólk ikki fara at halda seg aftur at koma til møtini av hesum orsøkum, men heldur at tað fara at koma enn fleiri fólk. Hetta merkir tó ikki, at vit ikki kunnu venda aftur til Sædding Center, men fyribils halda vit tað vera rætt at flyta møtini til Mølleparken.

Vit vilja takka leiðsluni í Den Kristne Forsamling í Mølleparken fyri hesa vælvild tey sýna okkum, samstundis sum vit vilja úttrykkja okkara stóra takksemi fyri, at vit hava kunna brúkt góðu hølini í Sædding Center í Esbjerg í so mong ár.

Ynskjandi hevði verið um vit kundu vitjað fleiri støð í Jútlandi. Um tað eru føroyingar á øðrum støðum í Jyllandi, sum ynskja at taka stig til kristiligar fundir á føroyskum, so vilja vit fegin rætta eina hjálpandi hond.

Sum áður nevnt eru vit fyrsta leygarkvøld í hvørjum mánað í Bethaniakirken, sum liggur í Dag Hammerskjøldsgade 2 í Ålborg, kl.19.00 og annað vikuskifti í hvørjum mánaða er vit í Esbjerg, Vejle og Sønderborg.

## Sangbólkurin Vitin

Vit høvdu tað gleði í farna ári at fáa vitjan av sangbólkinum Vitanum úr Betesda í Klaksvík. Hesin bólkurin savnar ikki bara nógv fólk heima í Føroyum, men so sanniliga eisini her í Danmark. Hann er komin hendavegin í fleiri ár bæði á sumri og í desembur. Í desembur eru teir altíð við okkum á túrinum “suður á land,” og tað vóru teir eisini nú í desembur. Hesaferð tóku teir sær kortini tíð til eisini at hava møtir í Hirtshals og í Ålborg; nakað, sum teir vónandi fara at taka til umhugsunar at endurtaka næsta ár. Møtið í Hirtshals varð hildið í høllini á motel Nordsøen, sum liggur beint aftanfyri Norðsjóarmiðstøðina, og møtið í Ålborg varð hildið í Bethaniakirken, í somu hølum, har vit hava tey vanligu mánaðarligu møtini.

Nógv fólk vóru til øll hesi møtini og vit upplivdu tað stóru gleði, at ein ung genta játtaði trúgv á Kristus á einum av hesum møtunum. Vit vóna, at Vitin eisini framyvir fer at gleða føroyingar í Jútlandi við sínum summar- og vetrarvitjanum her á leiðini. Feðgarnir, Levi og Rógvi Joensen, ferðaðust við teimum sum høvuðstalarar.

## Vitjan úr Onglandi

Fyrst í mars mánað fáa vit, um Gud vil, vitjan úr Onglandi. Tað er evangelisturin og bibliulærarin Don Hinshcliffe úr Sheffield, sum kemur hendavegin. Hann kemur til Keypmannahavn fríggjadagin 2. mars og kemur at tala í Kristnastovu sama kvøldið. Leygarkvøldið 3. mars talar hann á tí føroyska møtinum í Bethaniakirken í Ålborg. Hann skal búgva á Malta hesa vikuna, og kemur at tala á báðum møtunum sunnudagin 4.mars, og eisini mikukvøldið 7.mars.

Hetta er vikuskiftið, tá vit fara “suður á land,” og tá fær Don nógmikið at síggja til, tí hann kemur at tala á møtunum bæði í Esbjerg, Sønderborg og Vejle. Don er væl kendur ímillum føroyingar. Hann var á bíbliuskúla saman við Brynleif Hansen og Zacharias Zachariassen. Zacharias og Don hava verið góðir vinmenn í meira enn 45 ár. Hann hevur verið fleiri ferðir í Føroyum og tala í teim flestu samkomunum. Hann vitjaði í Føroyum bæði í ár og í fjørð. Don er 71 ára gamal. Møtini við Don Hinshcliffe fara at verða lýst nærri, tá vit nærkast mars mánað.